

## Claus spældi fulla tíð

Claus Bech Jørgensen spældi allar 90 minuttirnar, tá ið Coventry mánadagin spældi venjingardyst á ferð sínari í USA. Claus skuldi annars seljast til annað felag í summar, men hann heldur fram í Coventry, og hann hevur spælt við í fleiri av venjingardystunum undan nýggja kappingarárinum. Coventry spældi mánadagin ímóti Haloswen Town, og teir taptu 3-1. Coventry kom á odda, men misti so takið á dystinum. Claus Bech Jørgensen hevði ein gyltan kjans at skora, tá ið støðan var 2-1, men hann misnýtti góða tilboðið.

## FM í kast verður leygardagin

Her í hægstu summartíð byrja FM kappingarnar á bana innan frælsan ítrótt. Tann fyrsta av hesum kappingum verður komandi leygardagin, tá ið Bragdið, vegna FÍF, skipar fyri FM í spjótkasti, diskuskasti og hamarkasti.

Kappingin verður á kastivøllinum við Eysturskúlan í Havn, og byrjað verður við spjótkasti kl 14.00, síðan verður kappast í diskuskasti og at enda í hamarkasti. Tey, sum hava hug at verða við í onkrari av hesum kappingum, kunnu tekna seg umvegis heimasíðuna www.athletics.fo ella ringja á 213775 áðrenn fríggjakvøldið kl. 20.00.

# EB/Streymur kann taka tað róliga

**Tað tykist, sum hava hvørki Dómsnevnd ella Ítróttardómstólur eftirkannað, hvørjar dystir Knút V. Vesturtún hevur spælt fyri EB/Streym, nú ivi aftur verður sáddur um loyvi hansara at spæla fyri felagið. Hann spældi ongan dyst fyri EB/Streym, fyrr enn spæliloyvið sambært yvirliti hjá FSF var í lagi**

HB-MÁLIÐ
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

» Soleiðis sum málið er upplýst fyri Ítróttadómstólinum, er sannlíkt, at tveir aðrir leikarar hava leikt í sama leikumfari sum HB í steypakappingini, uttan at hava loyvisbræv til tað felag, ið leikt varð fyri.«

Soleiðis ljóðar partur av samlaða úrskurðinum, sum Ítróttardómstólurin um vikuskiftið gjørdi í Páll M. Joensen málinum.

Í hesum verður víst til samskifti, sum undir viðgerðini hevur verið millum Dómsnevndina og FSF-umsitingina.

### Spældi 30. apríl

Hetta samskifti hevur Útvarpið fingið hendur á, og mánakvøldið ljóðaði staðfestingin haðani, at »FSF ásannar at spæliloyvini hjá Knút Vesturtún og Klæmint Matras eru ikki í lagi.«

Og víðari var staðfestingin, at bæði HB, B36 og EB/Streymur kunnu verða dømd at tapa dystir, nú Páll M. Joensen málið skal viðgerast av nýggjum.

Men hetta er nú ikki heilt rætt. Sambært tí, sum varð ført fram í Útvarpinum, so kann EB/Streymur nú anda púrasta róliga. Sagt varð nevnliga, at Knút Vesturtún ikki var at finna aftur í EB/Streymi fyrr enn 25. apríl – tá fimm umfør vóru spæld av landskappingini.

Men veruleikin er samstundis, at Knút fram til flaggdagin als ikki hevði spælt dyst fyri EB/Streym. Knút var nevnliga skaddur í uppstartinum av kappingarárinum, og tí var fyrsti dystur hansara ikki fyrr enn 30. apríl. Ein veruleiki, sum hvørki FSF-umsitngin, Dómsnevndin, Ítróttardómstólurin – og fyri tað fjølmiðlar – hava ansað.

### Eru hvør sítt

Tá hetta er sagt, so er tað samstundis ein veruleiki, at skrásetti listin yvir spælarar og faktiska spæliloyvið eru púrasta hvør sítt hugtak. Hóast ætlanin við spælaralistanum er, at FSF við tíðini skal hava eitt amboð, sum er eitt fullkomið yvirlit yvir spæliloyvi, so er listin í sjálvum sær einki verdur sum grundarlag undir nøkrum máli. Og tað er í hesum sambandi eisini vert at hava í huga, at alt málið um Páll M. Joensen ikki snýr seg um, at spælarin ikki var á listanum. Men at sjálvspæliloyvið ikki var í HB.

Orðingin í brævinum frá FSF-umsitingini staðfestir nevnliga einki annað enn tað, sum skrásetingarnar – t.e. spælaralistin – vísa. Har verður nevnliga staðfest, at sambært »limalistanum« hjá HB frá 31. mai 1998 er hann at finna í HB. Og at hann sambært »limalistanum« hjá EB/Streymi er aftur at finna har flaggdagin í ár.

Somuleiðis hevur spælarin verið at finna á spælaralistanum hjá HB frá 1998, men heldur ikki hann kann nýtast sum nakað grundarlag í málinum.

Tí er spurningurin enn sum áður, hvørt Knút Vesturtún nakran tíð er fluttur formliga úr EB/Streymi til HB. Og – um so er – hvørt spælarin formliga er fluttur aftur úr HB til EB/Streym.



*Knút Vesturtún hjá EB/Streymi er drigin upp í endaleysa málið um spæliloyvið hjá Páll Mohr Joensen, men hann hevur eftir øllum at døma ikki spælt ólógliga í hesum kappingarárinum*

## Tað kostar at sleppa av við Nordlie

**Norska felagið Start skal av við fleiri milliónir krónur, eftir at teir søgdu venjaran hjá sær úr starvi í farnu viku. Fráfarni venjarin krevur eina stóra milliónaupphædd sum endurgjald fyri uppsøgnina**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Fyri einum hálvum ári síðani skrivaðu Start og venjarin Tom Nordlie undir ein nýggjan sáttmála, sum skuldi galda næstu trý árini. Nú hevur Nordlie fingið sekkin í Start, og hann ætlar sær at krevja eitt stórt endurgjald fyri uppsøgnina, sigur advokaturin hjá honum.

Start skal eftir sáttmálanum gjalda Nordlie løn næstu hálvttriðja árini, men partarnir skulu í næstum sámráðast um eina semju, so at Nordlie kann fáa eitt endurgjald og samstundis gerast leysur av sáttmálanum.

Fedrelandsvennen skrivar, at Start verður noytt at gjalda eina milliónaupphædd til Nordlie, samstundis sum nýggi venjarin, Stig Inge Bjørnebye, skal lønast av felagnum. Harvið fer venjaraskiftið at kosta felagnum nógvar pengar.

Tom Nordlie vil einki siga um við fjølmiðlarnar í løtuni, og í Start hevur leiðslan nú verið frammi og takkað Nordlie fyri arbeiðið, sum hann hevur gjørt í felagnum. Samstundis váttar leiðslan, at partarnir um tvær vikur skulu hittast til ein fund, har eitt fíggjarligt endurgjald til Nordlie skal viðgerast.

## Formulaliðið

**Ítróttar-Sosialurin mannar Formulaliðið við spælarum, sum stóðu seg væl í 17. umfari av Formuladeildini**

